# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO

# Nýggir Mondeo og C-MAX í Genéve

**Á altjóða bilaframsýningini í Genéve, sum letur upp fyri almenninginum 6. mars, verða høvuðsnýggjheitirnar hjá Ford nýggi Mondeo og ein ”faceliftaður” C-MAX**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Nýggi Ford Mondeo er tøkniliga tann mest framkomni evropeiski bilur, sum Ford nakrantíð hava gjørt. Stórur dentur er eisini lagdur á design, trygd og komfort á høgum støði. Við hesum rokna Ford við at náa enn fleiri Mondeo-kundar enn áður.

Hóast nýggi Mondeo ikki er so nógv størri enn forgangarin, er hann vorðin munandi rúmligari.

Ford Mondeo kemur á marknaðin í summar og fæst tá við 4 og 5 hurðum og sum stationcar. Mondoe fæst við fýra Duratorq TDCi Common Rail turbodieselmotorum við ávikavist 100, 125, 130 og 140 hk, og fýra Duratec benzinmotorum frá 1.6 til 2.5 litrar og 110 til 220 hk. Seinni í ár kemur eisini ein 2.3-litur Duratec motorur við 161 hk.




*Nýggi Ford Mondeo er tøkniliga tann mest framkomni evropeiski bilur, sum Ford nakrantíð hava gjørt*



*Ein onnur nýggjheit frá Ford er, at C-MAX hevur fingið ein sonevnda ”facelift” og líkist nú meira tí størra Ford S-MAX*



*Ford Mondeo stationcar*

# Evropeiskur Kia Ceed

**Koreanararnir hava gjørt eina av heimsins mest framkomnu bilverksmiðju í Slovakia, har hesin nýggi Kia Ceed verður gjørdur. Ceed skal kappast við bilar sum t.d. Ford Focus og VW Golf**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Motorjournalistar, sum hava royndarkoyrt bilin, geva honum sera góð skotsmál og ivast ikki í at Kia við hesum bilinum hava góð kort á hondum í hørðu kappingini um evropeisku kundarnar.

Umframt Kia Ceed hatchback verður eisini ein onnur útgáva sum eitur Kia Ceed Sporty Wagon, sum er bæði longri og hægri enn hatchback útgávan.



*Kia Ceed hatchback*



*Kia Ceed hatchback*



*Kia Ceed Sporty Wagon er bæði longri og hægri enn hatchback útgávan*